Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bjarni Hammer, løgtingsmaður

Svarari: Uni Rasmussen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Skeivar upplýsingar um Herjólf III

Spurningar:

1. Gav landsstýrismaðurin skeivar upplýsingar um, hvussu nógvan farm, bingjur og trailarar Herjólfur III hevur pláss fyri?
2. Gav landsstýrismaðurin skeivar upplýsingar um, hvussu nógvar persónbilar og ferðafólk Herjólfur III hevur pláss fyri?
3. Hvat ætlar landsstýrismaðurin at gera fyri at bøta um støðuna, soleiðis at tørvurin á suðuroyarleiðini verður nøktaður, sum landsstýrismaðurin hevur givið lyfti um?

Viðmerkingar:
Ósamsvar er í fleiri førum millum tað, sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur sagt um avloysaraskipið hjá Smyrli, Herjólf III, tá tað er kunnað um kapasitetin hjá avloysaraskipinum, og tað sum vísir seg at vera støðan.

Eitt dømi er í svari til § 52a fyrispurning frá undirritaða, har landsstýrismaðurin tann 30. juni 2022 skrivaði, at Herjólfur III tekur 67 bilar. Nú er komið fram í miðlunum, at Herjólfur III tekur 35-36 bilar.

Upprunaliga var upplýst, at Herjólfur III tekur 481 ferðafólk. Men sambært siglingarloyvinum hjá Skipaeftirlitinum hevur hann bara fingið loyvi til at føra 385 ferðafólk. Harumframt er nú eisini komið fram, at minni pláss verður til farm við Herjólfi III enn upprunaliga ætlað.

Landsstýrismaðurin tók endaligu avgerðina um, at lítla ferjan einsamøll skuldi røkja bæði ferðafólka- og farmaflutningin um Suðuroyarfjørð við høvuðsgrundgevingini, at tað var tann bíligasta loysnin.

Landsstýrismaðurin legði eisini ábyrgdina frá sær og bað suðuroyingar sjálvar finna sær okkurt skip, sum kundi nøkta tørvin, meðan Smyril var í dokk.

Sum nevnt omanfyri hevur landsstýrismaðurin havt ymiskar útsagnir, m.a. til tey, sum virka í framleiðsluvinnuni. Skiftandi fráboðanir kunnu gera tað trupult hjá framleiðsluvinnuni at leggja virksemið til rættis og kunnu harvið eisini skaða fiskaframleiðsluna í Suðuroynni.

Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á løgtingi, 24. august 2022

Bjarni Hammer